## Tá vóru tað eisini átta stig...

Í 2006 misti EB/Streymur á stokkinum. Hóast felagið úr Sundalagnum var oddalið so at siga alt kappingarárið, men í seinasta leikumfari vann HB oddasessin. Eftir 18 umførum fyri tveimum árum síðan vóru tað eisini átta stig sum skiltu EB/Streym og HB. Sundalagsmenn høvdu, júst sum nú, tá 38 stig, men HB høvdu 30. Soleiðis er eisini í ár, men nú er tað B36, sum rennur aftaná. Tað er tó lítið sannlíkt, at sundalagsmenn aftur skulu missa gullið í ár, men livst so spyrts...



## Sjálvmál í Klaksvík

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at Heðin á Lakjuni skeyt málið, sum KÍ fekk á heimavølli móti Víkingi. Á dómaraseðlinum er hetta tó skrásett sum sjálvmál. Talan var um óbeinleiðis fríspark, sum Heðin á Lakjuni sendi inn í Víkinga-brotsteigin, og tí skuldi ein aktiv gerð til, um mál skuldi dømast. Hesari stóð Geza Turi fyri, tá hann nart bóltin.

# Svangaskarð verður til fótbóltshøll

**Fótbóltssambandið hevur givið tilsøgn um at játta 6 milliónir krónur til ætlanina um at gera Svangaskarð til fótbóltshøll. Næsta stig er at tosa við Mentamálaráðið, sigur borgarstjórin á Toftum, Símun Johannesen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*30 milliónir skulu til, um Svangaskarð skal gerast til fótbóltshøll. Nú hevur Fótbóltssambandið játtað at koma við 6 av hesum*

- Kemur ein burðardygg verkætlan um eina fótbóltshøll framvið okkara borð, so eru vit reiðar at negla hana fasta í borðið.

Soleiðis segði FSF-forsetin, Høgni í Stórustovu, fyri góðum mánaði síðani, tá hann í Sosialinum varð spurdur, hvørjar fortreytir hann helt skuldu lúkast, fyri at skapa so góðar karmar sum gjørligt fyri menning av føroyskum fótbólti.

Síðani á nýggjárinum hevur tosið um eina fótbóltshøll nevnliga verið heldur ógreitt. Verkætlanin í Skálabotni hevði ilt við at fáa øll elementini at ganga upp í eina hægri eind, og eftir at hava útsett freistina fleiri ferðir, hevði FSF mist tolið við hesum. Serstakliga tí tað varð ikki mett ráðiligt, um felagsskapurin áhaldandi longdi tey evstumørk, sum UEFA hevði sett.

### Svangaskarð fingið góðkenning

Upprunaliga var vøllurin við Svangaskarð eisini við í kapprenningini um UEFA-stuðulsmilliónirnar, og tá ætlanin í Skálabotni varð sett á stand-by, tóku toftamenn sítt projekt framaftur.

Fyrimunirnir, sum toftafólk styðja seg til, eru, at eitt altjóða góðkent stadion, har infrastrukturin longu er í lagi. Og tí vil íløgan her alt annað líka verða væl minni, enn um ein nýggj fótbóltshøll skal byggjast frá grundini.

- Upprunaliga arbeiddu vit við eini verkætlan, har ein høll varð løgd yvir verandi vøllin, og har grasið varð skift við graslíki, sigur Símun Johannesen, borgarstjóri í Nes Kommunu.

- Tann ætlanin varð kostnaðarmett til á leið 20 milliónir, men síðani eru nakrar tillagingar gjørdar. Eitt nú við at økja um talið av skiftirúmum, tí tað ber illa til at reka bæði fótbóltshøll og B68 við bara tveimum skiftirúmum. Aðrar tillagingar eru eisini gjørdar, og tí verður ætlanin í dag kostnaðarmett til á leið 30 milliónir krónur, sigur hann.

### 6 UEFA-milliónir

Og hesum er FSF til reiðar at stuðla. Símun Johannesen váttar, at tey hava fingið tilsøgn frá Fótbóltssambandinum, um at tey vilja lata seks milliónir í stuðuli til ætlanina, og tí heldur arbeiðið kring ætlaðu høllina fram.

Fótbóltssambandið hevur í hesum umfarinum møguleika at stuðla verkætlanum til frama fyri menning av fótbóltinum við í alt 12 milliónum, sum koma úr grunni hjá UEFA. Menn í fyrstu atløgu er so valt at nýta helmingin av upphæddini til Svangaskarð. Ivaleyst tí FSF roknar við at hava tørv á peningi til aðrar verkætlanir eisini.

- Enn resta sjálvandi 24 milliónir, og sjálvandi eru vit eisini sinnað til at fíggja part av hesum. Næsta stigið verður so at tosa við Mentamálaráðið, og her er ein fundur við landsstýriskvinnuna stungin út í kortið. Eisini ætla vit okkum at tosa við Heilsumálaráðið, tí vit halda avgjørt, at ein slík høll vildi verið gagnlig fyri fólkaheilsuna. Eg veit ikki, um Heilsumálaráðið kann stuðla eini slíkari verkætlan fíggjarliga, men vit halda avgjørt, at ráðið kann virka til at styrkja okkara argumentatiónir, sigur Símun Johannesen.

### Veldst um pengar

Hóast bjartskygdur, nú FSF hevur givið sína tilsøgn, so vil Símun Johannesen enn ikki seta nakra dagfesting á, nær føroyingar kunnu spæla fótbólt undir taki á Svangaskarði.

- Tað veldst sjálvandi alt um pengar. Men vit hava sjálvandi eina meting frá serfrøðingum innan økið, og hesa tíðarætlan kenna tey eisini í FSF, har vit hava havt okkara framløgu. Nú arbeiða vit so fyrst og fremst við at fáa fíggingina í rættlag, og her er fyrsta stigið so tikið nú, sigur borgarstjórin.

## Spaniólar vilja hava danska gullið

**Spanska OL-nevndin hevur enn einaferð kært sigurin hjá donsku siglarunum í 49'er-flokkinum**

OL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um eina sera dramatiska finalu, tá kappsiglingin í 49'er-flokkinum varð avgjørd í gjáramorgunin.

Danski báturin lá væl fyri undan finaluni, men stutt undan startinum brotnaði masturin á bátinum, og so vóru góð ráð dýr.

Boðini til teir báðar, Jonas Warrer og Martin Kirketerp, vórðu, at teir skuldu fara í holt við at "stjala" ein annan bát. Áðrenn starturin fekk, høvdu donsku leiðararnir tó fingið loyvi frá kroatum at læna teirra bát, og fagnaðurin var ovurstórur, tá donsku sjómenninir komu inn sum nummar sjey, meðan argastu kappingarneytarnir ein fyri og annar eftir máttu lúta í ófantaliga veðrinum, sum gjørdi um seg.

Spania, sum vann silvur, gjørdi av at kæra, tí danir altso sigldu í kroatiska bátinum, men tann kæran varð í fyrsta umfari avvíst, og sjálvir søgdu sponsku sjómenninir, at teir vóru væl nøgdir við silvurið.

Men tað hevur so ikki steðgað spaniólum í at senda enn eina kæru inn. Hesa ferð er kæran send altjóða ítróttardómstólinum, CAS.

- Um CAS velur at gera nakað við málið, skulu tey fyrst gera av, um dómsnevndin í OL hevur fylgt áløgdu mannagongdunum. Hevur nevndin ikki tað, kann CAS velja at ógylda danska sigurin. Men tað meta vit vera ógvuliga ósannlíkt, sigur Jesper Frigast Larsen, sum er leiðari hjá donsku OL-nevndini, við Ekstra Blaðið.

Jesper Frigast Larsen leggur afturat, at skuldi tað hent, at spaniólar vinna málið hjá CAS, merkir hetta eisini, at stílast skal fyri nýggjari heiðursmerkjahandan.



*Veðrið var av tí ringasta, tá danski 49'arin vann gull í kappsigling á olympisku leikunum*